

## CNN-reportari skurðviðgerð gentu

Reportarin hjá CNN á Haiti, Sanjay Gupta, kann annað og meira enn bara at rapportera tíðindi til heimsins hyggjarar frá kreppurakta Haiti. Gupta er eisini neuroskurðlækni, og mánadagin framdi hann eina heilaskurðviðgerð á einari 12 ára gamlari haitiskari gentu umborð á amerikanska herskipinum, Carl Vinston. Gentan hevði fingið eina sentimetur langa skeinu á heilan undir jarðskjálvtanum á Haiti seinasta týsdag, og hevði tí akuttan tørv á hjálp. Umborð á Carl Vinston varð tí leitað eftir neuroskurðlækna. – Við hjálp frá einum CNN-produsara ringdu vit til CNN í Atlanta, sum stillaði okkum ígjøgnum til Gupta í Port-au-Prince, sigur Erik Schneider, talsmaður hjá Carl Vinston. Sanjay Gupta fór beinanvegin umborð á sipið, har hann framdi heilaskurðviðgerðina, skrivar danska blaðið boersen.dk.

*Petur Zachariasen, matematikari, og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, kunnaðu tinglimir um ætlanina um nýggja valskipan*



# Kunna um nýggja valskipan

**Formansskapurin í Løgtinginum hevur í morgun kunnað tinglimir um eina ætlaða nýggja valskipan, ið skal deila Føroyar upp aftur í fleiri valdømir**

VALSKIPAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Vit hava í eina tíð arbeitt við einari ætlan um at fara aftur frá Føroyum sum eitt valdømi tiol eina skipan við fleiri valdømum. Vit í formansskapinum hava ikki tikið støðu til, at um henda nýggja skipanin er hin rætta, men vit hava kortni hildið hana verið so mikið áhugaverda, at vit hava valt at kunna tinglimir um hana,sigur Hergeir Nielsen, løgtingsformaður.

Hann sigur, at formansskapurin ikki hevur tikið nakra endaliga støðu um eina nýggja skipan, men vilja tosa um hana uttan at nakrir múrar forða.

- Meiningin var jú, at landsstýrið skuldi gera eitt greiningararbeiði um, hvussu nýggja valskipanin við einum valdømi hevur hepnast, men tann frágreiðingin er ikki komin og kemur neyvan, og tí hava vit í formansskapinum valt at gera hesa kanningina, sigur Hergeir Nielsen.

Hann sigur, at tað tykist lítil áhugi í at venda aftur til gomlu skipanina við sjey valdømum.

- Reaktiónin var so, sum væntast kundi, at tinglimir taldu upp á knapparnar og roknaðu eftir, hvussu teirra støða var frá seinast og til tann møguleika, sum nú liggur fyri. Og eg rokni við, at tá nú hesar frágreiðingarnar frá hesum báðum serfrøðingunum hevur fingið tíð at sorna, fara tinglimir eisini at umhugsa støðuna, sigur Hergeir Nielsen.

Hann sigur, at teir sum formansskapur alla tíðina fara at hava fingurin á pulsinum fyri at vita, um hetta er nakað, sum tað loysir seg at arbeiða víðari við.

- Høvuðsniðurstøðan er, at enn er eingin støða tikin til nakað sum helst. Hetta er eitt áhugavert mál, sum vit í frið og náum kanna, sigur Hergeir Nilsen, løgtingsformaður.


## Havstovan søkir eftir maskinmeistara



**Søkt verður eftir einum maskinmeistara til Magnus Heinason at byrja 1. mars 2010.**

**Lýsing av Magnus Heinason**
R/S Magnus Heinason
Tórshavn, TN 407, OW 2252,
bygdur í Tomrefjord, Noreg í 1978

Skipaslag: Havrannsóknarskip

Klassi: DNV*1A1, ICE-C

Longd (LOA): 44,50 m
Breidd: 9,52 m
Djúpd: 7,15 m

BRT: 669
Høvuðsmotorur: 1800 HK M.A.K.
Ravmagn: 3x380/220 V AC.
2xMTU, 288 KVA, 1500 rpm.

Útgerð:
Botn- og flótitrol
Ekkolodd, EK-500
Asdic
Plankton net
CTD við rosettu, fluorometri og ADCP
GPS og DGPS
Arpa-radara
Satelittsamband

**Førleikakrøv**
- *Mininum vinnubræv sum maskinistur á 1. stigi*
- *Heilsuprógv*
- *Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð*
- *Roykkavari*
- *Góðan røkjuskap*
- *Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva*

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Havstovan**
**Nóatún 1**
**P.O. Box 3051**
**FO-110 Tórshavn**

og skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 25. januar 2010.

Nærri upplýsingar um starvið kann fáast við at venda sær til Erling í Liða, reiðara, á tlf. 35 39 00 ella e-post: erlingl@hav.fo

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo